**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 001/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina** (Víðkaðar heimildir at seta ávís onnur avmarkandi tiltøk í verk mótvegis Russlandi ella Hvítarusslandi, sum hava til endamáls at tryggja frið og trygd ella virðing fyri fólkaræði, rættarsamfelagi, mannarættindum ella altjóðarætti annars, heruppií í sambandi við hybridhóttanir, brot á mannarættindi, o.a.)

Landsstýriskvinnan í uttanríkis- og vinnumálum, Sirið Stenberg, hevur lagt málið fram tann 14. august 2025, og eftir 1. viðgerð tann 28. august 2025 er tað beint Uttanlandsnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 10. september 2025, 30. september 2025, 13. oktober 2025 og 22. oktober 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu í uttanríkis- og vinnumálum, saman við einum umboði frá PET, Aksel V. Johannesen, løgmann, Jóhan Christiansen, landsstýrismann í fiskivinnu- og samferðslumálum, Vørn, Michael Boolsen, fúta, Fíggjarmálaráðið og TAKS.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tríggjar minnilutar.

**Meirilutin** (Bjarni Hammer, Høgni Hoydal, Annika Olsen og Karlot Hergeirsson) hevur hesar viðmerkingar:

Hin 6. mai 2022 samtykti Løgtingið løgtingslógina um avmarkandi tiltøk, sum gav landsstýrinum heimild at áseta nærri reglur um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina (LM-136/2021). Við hesum tóku Føroyar sjálvstøðug stig til at seta revsiatgerðir í verk í sambandi við ólógligu russisku innrásina í Ukraina.

Síðani hava Føroyar víðkað heimildirnar munandi og sett fleiri tiltøk í verk ímóti Russlandi. Til dømis er ein umfatandi havnastongsil settur í verk, og noktað er russiskum skipum atgongd at fiska í serøkinum millum Føroyar og Bretland. Eisini er eftirlitið við russiskum skipum hert.

Politikkurin hevur verið greiður: Føroyar skulu við egnari avgerð seta revsitiltøk í verk ímóti Russlandi, sum eru proporsjonal – t.e. at tey eru lutfalsliga minst líka strong og avmarkandi sum tey hjá grannalondunum í Evropa og í Norðuratlantshavi.

Síðani 2024 hevur Evropasamveldið (hereftir ES) sett í verk onnur tiltøk móti Russlandi og Hvítarusslandi við støði í hóttanum um hybridálop. Hybridálop eru atgerðir, sum eru undir markinum fyri hernaðarligum virksemi, men sum eru ætlaðar annaðhvørt at røkka sama endamáli, ella at styðja verulig hernaðarátøk, heruppií við netálopum, uppíblanding í fólkaræðisligar skipanir, nýtslu av flóttafólkastreymum, kaðalslit, njósnaraátøk o.t. Hesi tiltøk, grundfest í fyriskipanir frá ES, eru ikki longur avmarkaði til einans at fevna um atgerðir í sambandi við álopið á Ukraina. Møguleiki er nú eisini at svara aftur russiskum hybridatgerðum, sum kunnu fara fram í øðrum londum enn Ukraina, og at seta í verk tiltøk ímóti brotum á grundleggjandi mannarættindi og vantandi rættartrygd innanhýsis í Russlandi.

Skulu Føroyar kunna samstarva við grannalondini og seta líknandi tiltøk í verk, er neyðugt at útvega nýggjar heimildir fyri at seta tiltøk í verk, sum byggja á trygdarmetingar og trygdarmál.

Endamálið við uppskotinum frá landsstýrinum er at útvega slíka heimild, so at Føroyar kunnu taka lut í og stuðla átøkunum, sum ES, Noreg og onnur samstarvslond hava sett í verk ímóti Russlandi.

Landsstýrið vísir á, at atvoldin til uppskotið serliga eru tiltøkini í sambandi við hybridhóttanir eftir fyriskipan 2024/2642, tí tvey russisk feløg, Murman SeaFood og Norebo JSC, sum hava fiskiloyvi í føroyskum sjógvi, eru millum teirra, sum sambært ES eru undir illgruna fyri at fremja hybridatgerðir, og sum sostatt koma undir strong, avmarkandi tiltøk. Hesi feløg hava eisini fiskiloyvi í norskum sjógvi, men 7. juli 2025 boðaði norska stjórnin frá, at Noreg fór at seta somu tiltøk sum ES í verk. Hetta merkir ítøkiliga, at nevndu feløg ikki longur sleppa í norskar havnir, ikki longur sleppa í norskt sjóøki, 12 fjórðingar úr grundlinjunum, og at fiskiloyvi í norskum serbúskaparøki, t.e. innan fyri 200 fjórðingar, ikki verða latin nevndu feløgum, sum higartil eisini hava havt skip við fiskiloyvi í norskum sjógvi.

Føroyar gjørdu í 1953 handilssáttmála við Russland um at selja teimum sild, og hava selt síðani, og tann 27. november 1977 gjørdu Føroyar og táverandi Sovjetsamveldið sáttmála um fiskiveiðu. Sáttmálin hevur síðani virkað sum karmur fyri árligu fiskiveiðusamráðingarnar millum Føroyar og Russland, seinast 27. november í 2024, sum eitt nú fevnir um kvotu- og atgongdarbýti.

Talan er um matvørur, sum ikki eru partur av nøkrum revsiatgerðum. Samanbera vit Føroyar og ES, so flyta Føroyar matvørur til Russlands og fáa pening heim til Føroya, ímeðan ES keypir olju og gass fyri hundraðtals mió. kr. um dagin og flytur pening til Russlands. Føroyskt virksemi fíggjar á ongan hátt russisku krígsmaskinuna, og føroysku revsitiltøkini hava lutfalsliga havt nógv størri avleiðingar enn tiltøkini hjá nógvum av grannalondum og samstarvslondum okkara.

Tað er fleiri ferðir ført fram, at russisk skip brúka føroyskar havnir til umskipan, og at Føroyar sostatt verða brúktar til at koma sær undan revsiátøkum. Føroyar hava tó sett fleiri tiltøk í verk ímóti Russlandi við heimild í verandi løgtingslóg. Eitt nú er noktað russiskum skipum at fiska í serøkinum, eins og umfatandi havnastongsil er settur í verk. Hesi tiltøk eru tó ikki uttan undantak. Eitt nú kunnu skip undir russiskum flaggi, sum fiska sambært fiskiveiðuavtaluni millum Føroyar og Russland, eftir galdandi kunngerð koma í føroyska havn, um tey hava ørindi, ið eru knýtt at fiskiskapi, t.e. umskiping ella landing av veiðu, sum er heimilað í fiskiveiðuavtaluni millum Føroyar og Russland, tó treytað av, at onnur veiða ikki er umborð. Skip undir russiskum flaggi, sum fiska sambært fiskiveiðuavtaluni, kunnu harumframt koma í føroyska havn, um eingin veiða er umborð, tó treytað av, at fiskiskipið fer beinleiðis til fiskiskap, ið er heimilaður í fiskiveiðuavtaluni.

Síðan Føroyar settu havnastongsilin í verk, er virksemið minkað munandi í Føroyum. Í ár hava 35 umskipingar verið í Føroyum. Til samanberingar vóru 196 umskipingar í Føroyum í 2020. Tí er tað blivið munandi lættari at fremja eftirlit, sum eisini er hert. Við smáum herðingum ber lættliga til at styrkja eftirlitið enn meiri, t.d. við at avmarka atkomu til at fevna um eina bryggju í Føroyum ístaðin fyri fleiri, og at syrgja fyri, at atløgubryggjan er innibyrgd, og at manningin ikki sleppur av havnalagnum.

Eftir viðgerðina av málinum, og eftir at hava havt fundir við viðkomandi aktørar, stendur tað greitt fyri meirilutanum, at neyvan er hald í illgrunanum um, at Føroyar verða brúktar sum umskipanarhavn til ólógligar sanktióneraðar vørur, og at Føroyar eru eitt stað, sum er uttanfyri lóg og landaskil, har russisk skip kunnu gera sum teimum lystir.

Tað er lítið og einki, sum talar fyri, at skipini, sum hava loyvi at fiska við Føroyar, fremja brot á lógina ella fiskivinnuavtaluna. Hetta er staðfest við eftirliti, og herdum eftirliti, bæði umborð á nevndu

skipum og á landi. Eftirlit er við veiðuni, umskipan, provianti og øðrum, sum kemur í land og/ella fer umborð. Higartil er onki at finnast at hesum viðvíkjandi.

Samanumtikið staðfestir meirilutin, at uppskotið snýr seg um eitt nýtt stig í føroyskum uttanríkis- og trygdarpolitikki, har føroyskir myndugleikar vilja útvega sær egnar heimildir at seta tiltøk í verk ímóti virksemi, persónum og feløgum, ið verða mett at hótta trygdina í føroyska samfelagnum, í Norðurhøvum og í heiminum sum heild. Í hesum føri verður heimildin útvegað við broyting í galdandi lóg um revsiatgerðir í sambandi við álopið á Ukraina.

Meirilutin heldur, at tað er sera avgerandi, at Føroyar sjálvar og føroyskt fólkaræði taka allar slíkar avgerðir um trygdarpolitikk og atgerðir í tí sambandi, og meirilutin tekur undir við, at hendan heimildin verður útvegað í verandi uppskoti í mun til uttanríkispolitisku og trygdarpolitisku støðuna, sum hon er í løtuni.

Tó heitir meirilutin á landsstýrið um beinanvegin at gera og leggja fyri tingið eina yvirskipaða lóg um heimild til trygdarátøk, sum er galdandi fyri eitthvørt hóttandi virksemi – uttan mun til hvaðani tað kemur, og hvør fremur tað.

Í mun til heimildina í hesum uppskoti, treytar meirilutin sær, at landsstýrið ráðførir seg við Uttanlandsnevndina, tá og um tiltøk skulu setast í verk við heimild í hesi lóg.

Meirilutin staðfestir, at landsstýrið undir viðgerðini hevur víst á, at útvegað verður eitt greitt og rættartrygt grundarlag, áðrenn avgerð verður tikin um at nýta heimildina at seta ítøkilig tiltøk í verk ímóti virksemi, feløgum, persónum og/ella londum. Landsstýrið eigur sjálvsagt eisini at halda seg til grundregluna um proporsjonalitet og avvigaðan uttanríkis- og trygdarpolitikk í øllum avgerðum, har allar avleiðingar og grundgevingar verða lýstar til fulnar.

Føroyar hava eina galdandi avtalu við Russland um fiskiskap í Barentshavinum. Gjørdar avtalur eiga at haldast, eisini í hesum førinum. Tí verður gildiskoman fyri hetta lógaruppskotið broytt, eins og tørvur er á at gera aðrar broytingar av tøkniligum slagi. Meirilutin setir tískil fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

**1.** § 1, nr. 1 verður orðað soleiðis:

“Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

**“Løgtingslóg um ávís avmarkandi tiltøk”**

**2.** § 1, nr. 2 verður orðað soleiðis:

“Í § 1, § 3, stk. 1 og 3, § 4, stk. 1 og 4, § 5, § 6, stk. 2, § 9 og § 11, stk. 2 verður “Landsstýrismaðurin” broytt til: “Landsstýrisfólkið”, og í § 10, stk. 2 verður “landsstýrismaðurin” broytt til: “landsstýrisfólkið”.

**3.** § 2 verður orðað soleiðis:

**“§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.”

<u>Viðmerkingar:</u>

Til nr. 1 og 2

Broytingaruppskotini snúgva seg um broytingar av tøkniligum slagi. Hesar broytingarnar hava onga ávirkan á innihaldið í lógaruppskotinum.

Til nr. 3

Broytingin hevur við sær, at gildiskoman verður sett til 1. januar 2026. Orsøkin til hetta er, at Føroyar hava eina fiskiveiðuavtalu við Russland fyri 2025. Tað er týdningarmikið, at gjørdar avtalur verða hildnar. Við at broyta gildiskomuna til 1. januar 2026 ger uppskotið ikki inntriv í longu inngingnar avtalur.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við uppskotinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Ein minniluti** (Bárður á Steig Nielsen) hevur hesar viðmerkingar:

Vit hava seinastu árini átikið okkum ein nógv størri leiklut í uttanríkispolitiskum málum, og viðførir hetta, at vit á uttanríkispolitiska pallinum hava møguleika at leika eftir egnum áhugamálum og vinna okkum virðing og rættindi. Tí er tað umráðandi, at vit vísa í verki, hvat vit vilja uttanríkispolitiskt, og at vit hava eina strategi fyri at røkka hesum málum.

Málið hevur verið greitt frá byrjan: vit vísa, at vit eru ein partur av vesturheiminum, og vilja seta proporsjonal tiltøk í verk ímóti Russlandi.

Eftir ólógligu russisku innrásina í 2022 fekk landsstýrið við samtykt Løgtingsins, longu hin 6. mai 2022, við løgtingslóg (LM-136/2021) um avmarkandi tiltøk, heimild at áseta nærri reglur um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina.

Vit hava síðani samtykt víðkaðar heimildir og sett munandi fleiri tiltøk í verk ímóti Russlandi. Til dømis er ein umfatandi havnastongsil settur í verk, og noktað er russiskum skipum atgongd at fiska í serøkinum millum Føroyar og Bretland.

Undir hoyringum í nevndini er eisini komið fram, at eftirlitið við russiskum skipum er munandi hert, og hóast tað, eru tað ongi prógv fyri, at Føroyar verða brúktar sum umskipingarhavn av ólógligum sanktioneraðum vørum.

Hesi tiltøkini hava havt sera stóra ávirkan á føroyskt vinnulív, har serliga tænastuvinnan hevði sera nógv virksemi av russisku skipunum, sum komu í føroysku havn at umskipa ella leggja veiðuna upp, umframt at heili 25% av okkara útflutningsvirði, áðrenn innrásina, vóru til Russlands.

Hetta er gjørt, hóast matvørur eru undantiknar teimum sanktiónum, sum onnur lond hava sett í verk ímóti Russlandi. So vit kunnu staðfesta, at Føroyar higartil hava tikið minst líka stór stig ímóti Russlandi sum grannalondini í Norðuratlantshavi og ES.

ES hevur nú eisini sett í verk onnur tiltøk ímóti Russlandi og Hvítarusslandi við støði í hóttanum um hybridálop. Hesi tiltøk frá ES eru ikki longur avmarkaði til einans at fevna um atgerðir í sambandi við álopið á Ukraina, men møguleiki er nú eisini at svara aftur uppá hybridatgerðir, sum kunnu fara fram í øðrum londum enn Ukraina.

Føroyar hava havt fiskiveiðusamstarv við Russland líka síðan 1977, og er ein partur av føroyska fiskiflotanum og víðari virking á landi grundaður á rávøru frá hesum fiskiskapinum í Barentshavinum, sum er eitt týðandi bein undir okkara samlaða búskapi, ið fíggjar okkara vælferð. Serliga stóran týdning hevur hetta fyri ávís økir í landinum, og hetta eigur tí at viðgerast við virðing fyri hesum økjum.

Tað eydnaðist okkum at finna nýggjar marknaðir fyri tað mesta av tí útflutningi, sum fór til Russlands áðrenn innrásina, men tó fer ein rímiliga stórur partur framvegis tann vegin, og trupult tykist at vera at finna nýggjar marknaðir fyri hesar vørur við teimum avmarkaðu handilsavtalunum, Føroyar hava við onnur lond. Hóast áhaldandi royndir at fáa betraði handilsviðurskifti við ES, eru ongi ítøkilig úrslit komin buruturúr hesum enn, og ger tað støðuna hjá Føroyum enn meira avmarkandi viðvíkjandi møguligum útflutningsmarknaðum.

Vit hava, frá tí at innrásin byrjaði, valt at staðið saman við vesturheiminum og gjørt okkara til at ávirka russisku krígsmaskinuna við neyðugum sanktiónum, sum eru proportionalar við tað, sum serliga ES og Noreg hava gjørt. Við hesum uppskotinum verða sanktiónsmøguleikarnir hjá landsstýrinum víðkaðir til eisini at fevna um ávís reiðarí, sum sambært uppskotinum eru undir illgruna fyri at bera seg skeivt at, men sum nevnt hevur nevndin fingið upplýst, at ongi prógv eru fyri hesum illgruna.

Noreg er í løtuni í samskifti um nýggja avtalu við Russland um sínámillum fiskiveiðuavtalu, og nógv týðir á, at hetta eisini fer at innihalda eina nýggja avtalu um atgongd til norskt øki.

Føroyar eiga altíð at hava sum høvuðsmál at verja føroysk áhugamál, soleiðis at vit standa okkum væl úti og heima. Tí metir hesin minnilutin ikki, at tíðin er at seta hesa heimild í gildi sum nú er, og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Ein annar minniluti** (Jenis av Rana) tekur í stóran mun undir við teimum viðmerkingum, sum meirilutin hevur og tekur undir við broytingaruppskoti meirilutans.

Hesin minnilutin skal gera vart við, at tað eftir viðgerðina av málinum og eftir at hava havt fundir við viðkomandi aktørar, stendur minnilutanum greitt, at ikki kann útilokast, at Føroyar verða brúktar sum umskipanarhavn til ólógligar sanktióneraðar vørur, og at eftirlitið við russiskum skipum og manningum tí eigur at verða munandi styrkt. Hetta kann lætt og einfalt gerast við at avmarka atkomu til at fevna um eina, kanska tvær, bryggjur í Føroyum, ístaðin fyri fleiri, og at syrgja fyri, at atløgubryggjan er innibyrgd, og at manningin ikki sleppur av havnalagnum.

Somuleiðis kann heldur ikki, við núverandi avmarkaðu eftirlitsførleikum, útilokast, at skipini, sum hava loyvi at fiska við Føroyar, fremja brot á lógina ella fiskivinnuavtaluna.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin undir við uppskotinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Ein triði minniluti** (Jacob Vestergaard) hevur hesar viðmerkingar:

Hetta uppskotið er eitt týðiligt dømi um, at Føroyar ongan sjálvstøðugan uttanríkispolitikk hava. Vit skulu fylgja ES og Danmark í øllum lutum.

Tað, sum danski forsætismálaráðharrin, Mette Frederiksen, og donsku verju- og uttanríkismálaráðharrarnir, Troels Lund Poulsen og Lars Løkke Rasmussen, halda, ja, tað halda vit eisini.

Sama við føroysku fólkatingsumboðunum, sum ganga ørindi fyri donsku stjórnina. Tey, eins og Uttanríkisráðið, halda, at vit skulu fylgja donskum uttanríkis- og verjupolitikki.

Hesi røkja ikki føroysk áhugamál.

Orsøkin til uppskotið sigst vera, at russisku feløgini Murman SeaFood og Norebo JSC eru undir illgruna fyri at fremja hybridatgerðir í ES. Tað framgongur ongastaðni, hvør orsøkin er til hendan illgrunan.

Viðgerðin í Uttanlandsnevndini hevur víst, at talan er um illgitingar og leysar pástandir, tí ongar ítøkiligar ábendingar ella ítøkilig prógv eru fyri, at nevndu feløg eru ein hybridhóttan ella fremja brot á grundleggjandi mannarættindi og vantandi rættartrygd innanhýsis í Russlandi.

Uppskotið átti tí at verið tikið aftur, tí Løgtingið kann ikki viðgera eitt uppskot, hvørs innihald vísir seg at verða bygt á leysar pástandir og á, hvat onnur halda.

Hetta má vera eitt eindømi, og brýtur við allar reglur um, at avgerðir skulu takast á upplýstum grundarlagi.

Tað eru heldur ongi mál, har russisk fiskiskip fremja brot á fiskivinnuavtaluna landanna millum ella brot á føroyska lóggávu, tvørturímóti. Eftirlitsmyndugleikar á økinum hava onki at finnast at, hóast hert eftirlit er við russiskum fiskiskipum.

Vanligt er, at mál av slíkum slag verða viðgjørd ímillum sáttmálapartarnar, áðrenn nøkur stig verða tikin, men tað er ikki hent í hesum førinum. Sáttmálaparturin, Russland, er ikki hoyrdur.

Russland hevur verið ein hollur samstarvspartur hjá Føroyum í mong ár, bæði á fiskivinnuøkinum, við m.ø. sínámillum fiskiveiðuavtalu síðan 1977, og sum keypari av føroyskum vørum og tænastum.

Tað sama kann ikki sigast um ES og Noreg, sum hava sett tiltøk í verk ímóti Føroyum, sum amboð at tvinga okkum at góðtaka teirra krøv í strandarlandasamráðingum um ferðandi fiskastovnarnar makrel, sild og svartkjaft.

ES og Noreg eru tí ikki “samsint lond” tá tað snýr seg um fiskivinnusamstarv í Norðuratlantshavinum, t.e. tí, sum er grundarlagið undir føroyska búskapinum.

Avleiðingarnar av, at uppskotið verður samtykt, eru ikki lýstar; bert at Uttanríkis- og vinnumálaráðið metir, at talan ikki er um sáttmálabrot.

Hóast Russland higartil ikki hevur latið við seg koma í samband við tey tiltøk, sum eru sett í verk, kann ikki væntast, at hetta heldur áfram.

Avleiðingarnar kunnu verða, at útflutningurin til Russlands steðgar, og/ella at fiskiveiðuavtala ikki verður gjørd fyri 2026.

Í báðum førum er talan um ógvusligar avleiðingar fyri føroyska búskapin.

Steðgar útflutningurin til Russlands, gongur tað serliga út yvir pelagisku virkini, sum selja makrel og sild til Russlands.

Hetta verður steinur omaná byrðu, tí føroysku kvoturnar av makreli og sild eru minkaðar munandi.

Um fiskiveiðusamstarvið við Russland steðgar, fær tað óbótaligan skaða fyri føroyska fiskivinnu og føroyska búskapin, serliga fyri tey reiðarí og økir, sum hava drúgvar royndir við fiskiskapi í Barentshavinum.

Vit missa nýggju framkomnu verksmiðjutrolararnar (íløgur fyri uml. 1,5 milliard kr.) og alla ta vitan, sum er bygd upp øll hesi ár.

Allar tær familjur, og tær eru ikki so fáar, hvørs grundarlag er bygt á inntøkur frá fiskiskapi í Barentshavinum, missa sítt tilverugrundarlag.

Hetta verða sannlíkt avleiðingarnar av einari lógarbroyting, sum er bygd á illgitingar og leysar pástandir, og á, hvat ES og Noreg, sum eru okkara mótpartar á fiskivinnuøkinum, og danskir politikarar, halda.

Hesin minnilutin tekur ikki undir við uppskotinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Uttanlandsnevndin, 13. november 2025**

| | | |
|---|---|---|
| Bjarni Hammer<br>formaður | Bárður á Steig Nielsen<br>næstformaður | Annika Olsen |
| Høgni Hoydal | Karlot Hergeirsson | Jacob Vestergaard |

Jenis av Rana